## Wales vann uppiborið

Føroyska U17-landsliðið hjá kvinnum tapti fyrsta dystin í EM undankappingini móti Wales. Úrslitið var 4-0. Støðan í hálvleikinum var 3-0. Føroysku kvinnurnar misnýttu tveir upplagdar málmøguleikar, meðan tað var málleyst. Men so setti Wales ferðina upp og vann uppiborið. Heimasíðan hjá Fótbóltssambandinum skrivar, at sigurin var ikki eitt mál ov lítið.



*Mynd: www.fsf.fo*

# Skandinavar skulu vera kaldir í hitanum

**ÍTRÓTTARKANNING** Magni Mohr og aðrir fara skjótt undir umfatandi kanningar, hvussu skandinaviski mannakroppurin reagerar, tá hann brádliga tekur nógvan hita til sín. Úrslitið verður ein menningarmøguleiki hjá føroyskum ítróttarfeløgum, sum kunnu leggja sínar fyreikingarnar eftir úrslitinum

Uni Holm Johannesen

Tað er ofta ein trupulleiki, tá føroyingar royna seg á altjóða fótbóltspallinum.

– Tað var torført at seta ferð á í nógva hitanum, var niðurstøðan hjá Mikkjali Thomassen, sum stóð á odda fyri besta mansliðnum hjá B36 í útidystinum móti Olimpi Rustavi í Europe League í fjør.

– Í hitapottinum, sum vøllurin var, megnaðu okkara at arbeiða nógv og hart og at halda tætt seinasta tíman, segði Pauli Poulsen, sum var hjálparvenjari hjá NSÍ, tá runavíkingar royndu seg móti Dinamo Tbilisi á útivølli í 2008.

– Bæði undan og eftir fyrstu venjingina hjá landsliðnum mikudagin vóru spælararnir vigaðir, so tað var greitt, hvussu nógva vætu, teir mistu. Niðurstøðan var, at spælararnir missa nógva vekt í hitanum, skrivaði Jákup Mørk, fyrrverandi ítróttarskrivari á Sosialinum, undan landsdystinum móti Serbia á útivølli í 2008.

– Hóast tað eydnaðist KÍ-kvinnunum at halda tætt í yvir 40 hitastigum, so hálvleiksstøðan var 0-0, eydnaðist tað ikki allan vegin, og talan gjørdist um eitt 0-2 tap, skrivaði Hilmar Jan Hansen í dystarfrásøgnini, tá KÍ royndi seg á útivølli móti franska Montpellier í 2008.

Nógvu hitastigini eru til stóran ampa fyri fótbóltsglaðu amatørarnir, sum hava sína dagligu gongd í kalda og veðurbarda Norðuratlanshavinum.

Nú verður ætlandi léttari hjá føroyingum og skandinavum at fyrireika seg til ítróttarkappingar í nógvum hitastigum

Magni Mohr og aðrir fara í samráð við Københavns Universitet undir drúgvar kanningar, hvussu mannakroppurin hjá skandinaviskum ítróttarfólkum, sum liva í lutfalsliga køldum umhvørvi, berur seg at, tá hann tekur brádliga nógvan hita til sín.



*Magni Mohr hevur doktararitgerð í ítrótti*

*Savnsmynd: Álvur Haraldsen*

– Gransking er fyrst og fremst at fáa vitan og staðfest ymisk hagtøl. Við hesum fær skandinaviskur ítróttur betri grundarlag at fyrireika seg til kappingar í nógvum hita, sigur Magni Mohr.

Ein hópur á 22 fótbóltsleikarar úr Føroyum og Danmark venda nøsini móti Qatar í oktober, har fleiri venjingar eru á skránni í nógva hitanum. Ferðaliðið verður burtur í 12 dagar.

### Umfatandi verkætlan

Tað er ikki lætt hjá skandinaviskum mannakroppi at venja seg við nógvan hita alt fyri eitt. Musklarnir og blóðrensli verður ávirkað og skal royna at leiðrætta seg eftir hitanum.

Tað hevur ávirkan á avrikið, sum skandinavar leggja fyri dagin. Fyri at handfara trupulleikan frægast tilber, er ætlanin at fáa staðfest í tølum, hvussu ítróttarfólkini verja seg fyri hitanum.

– Føroysk fótbóltslið royna seg í altjóða kappingum á hvørjum ári, og hitin ger ikki uppgávuna léttari. Nú fáa vit staðfest, hvussu kroppurin reagerar, og so er møguleikin at leggja fyrireikingarnar eftir tí, sigur Magni Mohr.

Millum annað eru tveir venjingardystir á skránni á ferðini. Annar dysturin verður í eini ítróttarhøll, har hitastigini verða 15 í tali.

Hin dysturin verður uttandurða í 40 hitastigum.

Nøkur av úrslitunum verða klár alt fyri eitt, men endiliga tilmælið verður neyvan liðugt fyrr enn um seks mánaðir.

– Tað er ein umfatandi kanning, sum fevnir víða, og sum verður viðgjørd í ymsum tíðaritum. Tað verða ikki bara føroyingar, men fleiri ítróttarfeløg í Evropa, sum fara at nýta kanningarúrslitini, sigur Magni Mohr.

*uni@sosialurin.fo*

### FAKTA:

- Magni Mohr hevur doktararitgerð í ítrótti.
- Hann hevur verið hjálparvenjari hjá Sigfríði Clementsen í B36 og EB/Streymi
- Hann hevur luttikið í fleiri altjóða vísindaprojektum á ítróttarøkinum.
- Hann var knýttur at venjarahópinum hjá Juventus í fýra ár. Italska felagið vann í hesum tíðarskeiðnum trý meistaraheiti, tvær steypafinalur, umframt at liðið vann seg í finaluna í Champions League.
- Hann hevur verið knýttur at venjaratoyminum hjá Chelsea.
- Hann hevur áður hjálpt føroyska landsliðnum, liðnum í donsku superliguni og danska landsliðnum sum fysiskur venjari.



*Myndir: Álvur Haraldsen*

# Marius Joensen er aftur føroyameistari!

**SKJÓTING** Marius Joensen føroyameistari í Skeet. Tað varð greitt um vikuskiftið, tá FM-kappingin var á Norðskála og á Sandvíkum í vikuskiftinum

Uni Holm Johannesen

Trý umfør vóru skotin á Norðskála leygarmorgunin, og tvey umfør, umframt finalan, vóru skotin á Sandvíkum seinnapartin í gjár.

Veðrið var av tí besta, og líkindi at skjóta vóru góð.

Bara ein dúgva skilti Mariusi Joensen frá nærmastu kappingarneytunum.

Tað var neyðugt við umskjóting, áðrenn vinnarin varð funnin, og tað eydnaðist akkurát Mariusi Joensen at endurvinna FM-heitið í Skeet.

*uni@sosialurin.fo*

## Endaliga úrslitið:

1. **Marius Joensen**, 120 av 150 dúgvum + 1
2. **Jóannis Joensen**, 120 av 150 dúgvum + 0
3. **Magni Dam**, 119 dúgvur av 150 dúgvum
4. **Sámal Debes**, 114 av 150 dúgvum

